Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um Hasfjord, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu ofta hevur Hasfjord verið á sleipistøð og/ella til umvælingar, síðan ferjan kom til landið?

2. Hvussu nógv hevur tað higartil kostað at umvæla, rætta brek, keypa eykalutir og annað á ferjuni, síðan hon kom til landið?

Viðmerkingar:
Aftur í dag hoyrdist í miðlunum, at Hasfjord hevur brek. Skipið, sum er bygt í 1975, varð keypt til Føroya um jóltíðir 2019, og kom til landið í 2020. Í mai 2020 fór Hasfjord í sigling, men tað tykist, sum ferjan javnan hevur brek ella aðrar trupulleikar.

Á Løgtingi, 24. februar 2021

Beinta Løwe Jacobsen